# Duruta

**Stuttsøga eftir Andreas Poulsen (Dia) í Bø**

Seint var á kvøldi. Tvey ung vóru á veg millum býlingarnar. Duruta og Jóan, sum nøvn teirra vóru, vóru komin at verða góð hvørt við annað, hóast teirra unga aldur. Men hvør kann siga, nær ástin skal vakna? Tá hon kemur av sær sjálvari, so er tað í lagi. Ástin er ofta óstøðug hjá teimum ungu, men ikki so sjaldan gjørdist fyrsta ungdómsástin kærleiki fyri lívið, sjálvt um tey ungu vórðu skild frá hvørjum øðrum.

“Hvat munnu foreldur tíni at siga, at vit hittast?” spyr Jóan. “Hvat skulu tey siga?” svaraði Duruta og tók um hond hansara. “Tú ert bóndadóttur,” segði Jóan. “Ja, tað eri eg; og tú ert bóndasonur,” segði Duruta. “Faðir eigur ikki so nógva jørð, sum faðir tín, og mín partur verður helst lítil; vit eru so nógv systkin,” segði Jóan. “Tað kann vera, at faðir eigur meira av ogn enn faðir tín, men eg eri ein genta, so tað man fara at verða lítið í mín part. Og vit eru eisini nøkur systkin. Vit skulu ikki vera døpur, um vit onga jørð eiga, eru vit góð hvørt við annað, skal tað ivaleyst ganga. Tað gongur eisini hjá teimum, sum onga jørð eiga, og kanska tey eru lukkuligari, enn tey, sum nógva jørð hava.” “Ja, vilt tú verða mín og ein útróðrarmanskona, so verði eg glaður. Men at hava hjallin á sjónum er tiltikið.” Jóan segði ikki meira, men hann visti, at bóndur vildu, at døtur teirra giftust múgvandi bóndasynum. Tað var tryggari og meira æruvert enn bara at líta á sjógvin og so at vera bønamaður hjá onkrum bónda.

Tey fylgdust til Norðastustovu, heim Durutu. Áðrenn Duruta fór innar, høvdu tey lovað hvørjum øðrum, at tey altíð vildu elska hvørt annað. Hetta komu tey eisini at halda. Men tey komu at sanna, at kærleiki millum tvey, sum ikki fáa loyvi at liva saman, er sárur, ja, pínir tey, sum eiga hann. Lívið verður ein byrða. Tú kanst látast at vera glaður í løtum, men tað verður eingin sonn gleði, tí altíð vil kærleikin til tann, tú elskaði, koma fram í huga tínum. Tá mást tú finna tær eitt stað, har tú kanst verða í huganum saman við ástarvini tínum, siga honum, at tú framvegis ert góður við hann, spyrja, hvussu hann hevur tað, um hann eisini er góður við teg, siga, at tú ynskir, at hann og øll hansara hava tað gott. Seinast fellur eitt tár, eitt eymt kærleikans- men treiskt tár. Og tá tú hevur oyst og tømt tína ástarkeldu, kanst tú fara aftur til verka.

Duruta og Jóan komu saman, tað sum eftir var av vetrinum. Og várið kom og fór, men enn søgdu foreldur hennara onki. Um tey onki vistu, ella onki vildu siga, visti hon ikki. Tó vita tað, tað máttu tey. Sovorðið duldist ikki.

Men so ein dag, meðan móðir og dóttir vóru einsamallar í roykstovuni, bar móðir hennara tað upp á mál við hana. Hon segði, at sjálv setti hon seg ikki ímóti, um hon vildi hava Jóan, men helt, at hon var so ung enn. Hon hevði tíðina fyri sær. Ein átti ikki at binda seg so tíðliga. Men faðiri hennara dámdi tað lítið. Ja, hann var beinleiðis illur. Tað var hon, móðirin, sum hevði biðið hann bíða við at siga nakað. Kanska fóru tey ungu at broyta hugsan.

Duruta hugdi upp á móður sína: “Nokta tit Jóani og mær at koma saman, verður tað at skilja meg frá tykkum. Eg eri góð við Jóan, og eg komi ongantíð at elska nakran annan.” “Bíða nú, lát ikki so í, tú ert ung enn. Vit vilja tær alt tað besta. Lívið er ikki bara dansur á rósum. Nakað krevst til lívsins uppihald, og faðir tín heldur, at Jóan er ov fátækur til gera teg eydnuríka.” “Faðir og tú eiga almikið til lívsins uppihald, men eru tit eydnurík? Ert tú, móðir, lukkulig?” Nú var Duruta ill. Hon næstan angraði tað, hon hevði sagt. “Um eg eri lukkulig, ja, tað veit eg ikki, hvat eg skal siga til. Faðir tín hevur verið arbeiðssamur. Hann hevur røkt garðin væl. Okkum hevur ongantíð trotið nakað. Vit hava verið mett og verið væl klødd. Faðir tín er harðligur og bonskur av lyndi, tað er hann. Men øll hava vit okkara av tí góða og tí illa. Hann hevur kanska ikki sýnt tykkum so nógvan kærleika, men hann er góður við tykkum kortini. Eingin livir av berum kærleika. Og eg eri nøgd við lívið,” segði móðir hennara. “Eg verði ikki nøgd við lívið, um eg ongan kærleika fái, og ongan kærleika fái givið. Eg vil elska mann mín, og eg vil verða elskað av honum.”

Duruta segði onki meira, og móðir hennara tagdi eisini. Hon hugsaði við sær: “Er hetta Duruta, dóttir mín, sum tosar so? Hon, sum er so ung. Tosar um at elska, um kærleikan.” Hon mátti líta at henni, har hon stóð við vindeygað. Vøkur var hon. Ei undur í at drongirnir fjeppaðust um hana.

Nú var hon álvarsom, men óð var hon ikki longur. Men móðirin visti, at hon goymdi tað, hon hevði sagt, í sinninum. Og móðirin hugsaði víðari:”Var tað nú satt, sum eg segði? Havi eg verið nøgd? Havi eg ikki ofta ynskt, at Hanus sýndi mær kærleika? og havi eg ikki sjálv viljað sýnt honum kenslur mínar? Jú, men hann legði líka í kenslur. Hann var kaldur og kensluleysur frá fyrsta degi, og so varð hon eisini kølnað. Børn høvdu tey fingið, men tey kundi ein fáa uttan tær heitu kenslur og kærleika.

»Og nú gekk hon her og fekk at vita frá síni blaðungu dóttur, at soleiðis ætlaði hon ikki at liva lívið. Hon valdi mannin, sum hon elskaði, og so skuldi lívið laga seg hareftir, meðan hon, móðir hennara, hevði valt mannin, sum átti nógva jørð, og so skuldi lívið laga seg eftir tí.«

Nú sá hon, hvussu skeivt, hon hevði borið seg at. Hon hevði gift seg við nøkrum merkrum av jørð. Samlívið við mannin kom í aðru røð. Hon var eins og Hanus. Garðurin og tað, tey áttu av jaraðarognum kom fyrst. Hanus hugsaði mest um, hvussu til stóð á garðinum, um seyðin í haganum og neytini í fjósinum. Sjálvandi skuldi alt hetta gerast, men eitt var, at tað tók nógva tíð at arbeiða, annað var eisini at hugsa um tað, tá ein fríløta beyðst. Tey høvdu eisini arbeiðsfólk, bæði húskallar og arbeiðskonur, og tey vistu sjálvi, hvussu arbeiðið skuldi gerast.

Nústaðni sá hon, hvussu tómt, kærleiks- og gleðileyst hennara hjúnarband hevði verið. Gleðin var, at tey høvdu smíðað ein neytabás aftrat, síðan tey tóku við garðinum, at áseyðatalið helt sær støðugt og at garðurin varð hildin í góðari røkt og tí gav væl av sær.

Men hon sá nú, at hon hevði saknað nakað, og nú hevði dóttir hennara víst henni á, hvat tað var: Kærleikin millum millum hjún; gleðin at geva og fáa.

Skuldi hon liva lívið umaftur, so skuldi hon verið sum dóttirin. Hon skuldi valt kærleikan fyrst.”

Nú vóru Hanus og húskallarnir komnir í túnið. Teir talaðu lítið. Teir mundu vera móðir og svangir av dagsins strevi í bønum. Hon fór at geva teimum nátturða. Niðurfaringatíð var, og ein dagur kom væntandi aftur í morgin. Tað ráddi um at vera hvíldur til dagsins verk

Ein morgun hetta summarið rópti grindaboð í Stóruvág, og hvør maður fór í grind. Nú mátti hoyggj vera hoyggj, ella mátti konufólkið einsamalt taka sær av tí.

Í grind komu bátar allastaðnis frá. Grindin var góð at fáa. Kom hon ikki, so var mangan svangligt, serliga hjá honum, sum onki átti á landi.

Aftaná drápið komu menninir inn í húsini at fáa sær ein bita at eta og ein drekkamunn. Vanliga varð farið har, kennskapur ella slektskapur var. Eisini í Norðastustovu komu grindamenn. Faðir Durutu beyð teimum innar í stovuna, síðan kom hann uttar aftur í roykstovuna og bað konuna og dóttrina geva teimum at eta.

Gestirnir vóru úr Norðfirði. Duruta var biðin at borðreiða fyri teimum. Tað var ikki sørt, at hon firnaðist fyri at gera tað. Menninir vóru fremmandir. Hon kendi ongan teirra.

Hon hevði hug at rodna, tá allir hesir menninir hugdu at henni. Fleiri vóru rættuliga ungir, og tað gjørdi tað ikki betri.

Hon legði til merkis, at fleiri av teimum yngru hugdu í so kannandi at sær, og hon mátti viðganga, at hon nýtti tað, tá hon einaferð var komin fyri seg.

Tað gjørdi nú onki, um ein sá onnur fólk og serliga ung onkuntíð.

Tá grindamenninir høvdu fingið og sitið eina løtu og prátað, fóru teir avstað. Hanus beyð teimum at koma inn aftur seinni, um teir høvdu hug.

Hesin dagurin gekk fyri tað mesta við at borðreiða fyri grindafólki. Men arbeiðið á garðinum mátti eisini gerast.

Um kvøldið komu faðir Durutu og ein annar maður inn, og teir fóru í glas-stovuna. Duruta kendi mannin aftur frá fyrr um dagin. Hann var úr Norðfirði. Hanus beyð manninum sess, fór eftir fløsku og glasi og skonkti. Haraldur, sum maðurin æt, var bóndi. Hevði 10 merkur í festi, so hann var vælamaður. Hanus kundi vera errin at hava fingið slíkan mann á gátt.

Teir drukku nøkur gløs, og brátt fóru tey at gera sína ávirkan. Hanus reypaði um sín garð, hvussu væl alt stóð til, bæði við seyði og neytum. Haraldur afturímóti segði frá sínum stóra garði. 10 merkur góðu nógvan seyð, og grasið var til nógv neyt.

Teir vóru líkamenn, báðir av góðum fólki, sum teir søgdu. Einaferð sigur Haraldur: “Tú eigur døtur, og eg eigi son, Trónd. Skulu vit ikki royna at fá tey saman?” Hanus var kvikur at svara aftur. Hetta kom væl við hjá honum. Duruta, ja, hon skuldi tað verða. “Jú, eg eigi døtur. Hvat líktist tær á hana, sum borðreiddi fyri tykkum í dag?” “Tað var hana eg hugsaði um. Hana, haldi eg, Tróndur fegin vil hava. Hvussu eitur hon?” spurdi Haraldur. “Hon eitur Duruta,” svaraði Hanus. Og legði hann aftrat: “Eg skal siga tær, at eg verði fegin, um hetta kemur í lag. Eg havi hoyrt, at hon skal hittast í loyndum við ein drong hiðani úr bygdini. Faðir hansara eigur ikki nógva jørð, og fleiri eru børnini, so hann verður fátækur maður. Til slíkan mann lati eg ikki dóttur mína. Men hetta unga tonkir onki um lívið. Heldur ikki er hann av góðum fólki. Abbi hansara tók ein deyðseyða einaferð. Virðið var ikki nógv í honum, men hann átti hann ikki, so hann skuldi latið hann ligið.” Hetta helt Haraldur eisini. Báðir hildu, at blandaði tú hvítt og svart saman, varð úrslitið grátt. Best var, at hvítt og hvítt komu saman. Við hesum meintu teir við Durutu og Trónd. At menniskjan øll var fallin í synd, og tí ongin munur var, høvdu teir ikki fatað, sjálvt um teir høvdu sitið fremst í kirkjuni og harvið skuldu hoyrt best.

Ogn teirra var gáva frá Gudi, afturfyri at teir og forfedrar teirra høvdu ført seg væl millum manna. At teir róku rossini í haganum inn í grannahagan úr egnum haga, tá ongin sá, at teir søgdu seg at eiga øll tey ómarkaðu lombini, ið komu í rættina, um teir ikki kendu tey, og at teir hildu, at markini á teirra stykkjum í bønum máttu otast úteftir fyri ikki at minkast, hildu teir vera sjálvsagt. Tað ráddi at varða væl um tað, sum Várharra hevði litið teimum til.

»Ognin gav teimum eisini vald í bygdini. Fátækra-maðurin visti, at hann stóð seg best við at halda alt tað, sum valdshararnir teir søgdu, um tað var skrivað ella óskrivað lóg í landinum.«



Hetta hildu Hanus og Haraldur vera í lagi. Onkur mátti ráða úti í bygdunum. Kongur og hansara menn kundu ikki fylgja við, hvat fyrifórst úti um landið. Og teir hildu seg vera næstar til tað.

Áðrenn teir skiltust, høvdu teir gjørt av, at teir skuldu tosa við børn síni um hjúnalag. Og brúdleypið skuldi verða longu í vetur.

»Hanus hugsaði, at Duruta var nakað ung, bara 18 ár. Men hon hevði sjálv valt sær drong, so hon mundi vera búgvin til tað. Eisini helt hann tað vera best at fáa hana í hjúnalag so skjótt sum gjørligt. Slíkur drongur sum Tróndur beyðst ikki á hvørjum sinni.«

Ongin visti heldur, hvat kundi verða burturúr millum Durutu og Jóan. Hvat Duruta fór at siga til hetta, helt hann seg vera føran at loysa.

Duruta og Jóan hittust ikki so ofta eftir, at grindin var deyð. Faðirin legði meira arbeiði á hana, so fríløtur vóru mest sum ongar. Tó, onkuntíð kundi tað henda, at tey sóust. Duruta og ein arbeiðskona, sum æt Jóhanna, vóru vinkonur. Hon bar boð millum Jóan og Durutu, segði Jóani nær løgir vóru at hittast, og hvar tað kundi vera. Hetta gjørdi tað hóast alt meira spennandi. Tey vistu ongantíð hvar ella nær tey kundu hittast. Var veðrið ringt, so hittust í sornhúsinum ella í onkrum gróthúsi. Var gott veður, so kundi tað vera úti onkustaðni. Jóhanna, sum sagt, bar boðini ímillum; segði hvar stevnumøtið skuldi vera.

Tað var óunniligt at fara niðan í sornhúsið í óveðri og myrkri. Kanska var Jóan ikki komin. Men tað var hann oftast. Betri var, tá veðrið var gott, og tey kundu hittast í bønum. Tá sást mánin og stjørnurnar, og tá var ikki so myrkt. Men hetta var spennandi at sníkja seg til sornhúsið, fara inn, og so var hann, hon elskaði, har og tók hana í favn og kysti hana. Men hvat um tað nú var onkur annar drongur, sum var í sornhúsinum? Hon óttaðist tankan. Ella at ganga niðan í bøin at hitta hann, knappliga hómaðist eins skuggi har, og tá var tað Jóan. Men hvat, um tað var onkur annar? Jú, hetta var spennandi.

Hon var góð við Jóan. Og hon visti, at hann eisini var góður við seg.

Ein dagin tíðliga um heystið rópti Hanus Durutu innar í stovuna. Har segði hann henni tað, sum Haraldur í Norðfirði og hann høvdu avrátt í grindini, sum hevði verið um summarið. Nú vóru boð komin, at tað var í lagi við hjúnalagi millum Trónd og Durutu. Haraldur hevði tosað við sonin, og tá Tróndur fekk at vita, hvør Duruta var, samdist hann fegin við faðirin um tað.

Hann hevði sæð Durutu, tá hann var í Stóruvág í grind í summar, og ikki fingið eyguni av henni, meðan hon borðreiddi fyri teimum. At hon skuldi bjóðast honum, helt hann næstan ikki vera satt.

Hann mintist aftur á hana, har hon gekk og stákaðist fyri teimum í stovuni. Miðalstór, myrkhærd, eygnabrýrnar vóru vakrar um hennara livandi eygu. Hon var vøkur. Hann hevði hugsað, hvussu tað hevði verið at kyst hana, og nú skuldi hon verða kona hansara. Tað kendist vónríkt.

Fyri Durutu varð hesin dagurin tann ringasti í lívi hennara. Hon royndi at tala ímóti faðiri sínum, segði, at hon hevði annan drong, sum hon var góð við. Hon kundi ikki giftast við nøkrum øðrum. Tað var eisini skeivt at gera móti Tróndi. Men faðirin var ikki at tosa við. Hann helt fyri, at hon skuldi vera glað og lukkulig at gerast bóndakona í Norðfirði. Tað var mong genta, sum øvundaði hana. At giftast manni sum Jóani, var tað sama sum at leypa beint í armóðina, og ikki kom hon úr henni aftur. Vildi hon ganga svong? Vildi hon, at hennara børn skuldu verða merkt av fátækradømi? Tað hevði hann ikki ætlað fyri síni abbabørn, segði hann. Og Jóan fór hon at gloyma skjótt. Tað var bara, tá ein var ungur sum hon, at ein tonkti, at til bar at liva av berum kærleika. Nei, tað skuldi meira til lívið enn tað. Bað hana gera seg til reiðar til brúdleypið. Tað skuldi verða um jóltíðir. Tróndur kom fyrsta dagin at vitja tey, og hon kundi so fara við honum til Norðfirðar. Nakað áðrenn brúdleypið skuldi vera, komu tey, faðir og móðir. Systkin o.o. í ættini skuldu koma í brúdleypið. Og áðrenn Duruta fekk málið fyri seg, var hann uttandura.

Duruta fór at gráta. “Hví var lívið so-leiðis? Hví kundi hon sjálv ikki ráða sær? Faðir segði, at hon var ov ung at hava Jóan, hví var hon so nóg gomul at giftast Tróndi? Var hon nóg gomul at giftast, var hon so ikki nóg gomul at ráða sær sjálvari?” Hon fór at hugsa um Jóan. “Hvat mundi hann halda um hana, at hon sveik hann fyri 10 merkur í jørð. Á, góði Jóan, eg elski teg og ongan annan. Men eg verði flutt við valdi. Eg verði altíð tín í huganum.” Hon hugsaði longu, sum at tey vóru skild frá hvørjum øðrum. Hon visti, at faðirin gekk ikki frá sínum. Hann var kensluleysur, sum móðir hevði sagt.

Meðan Duruta var í hesari sváru løtu, kom móðir hennara inn. Hon sá, at Duruta hevði grátið. “Góða barnið, hvussu veit við?” “Ja, tú veitst, at eg havi tað ikki gott. At tit kunnu vera so hørð! At flyta meg við valdi frá drongi mínum, frá vinfólki, ætt, frá bygdini, oynni og øllum tykkum. Hví eri eg ikki ov ung til tað?” segði Duruta hørm. Móðir hennara helt fyri, at hon var uttan skyld í hesum. Hon hevði tosað við faðir hennara, biðið hann bíða við at lova hana burtur, men hann var ikki at tosa við. Bað hana ikki verða líka býtta sum Duruta. Tað var ikki á hvørjum sinni, at tað stóð einum í boði at fáa 10 markagarð til dóttur sína.

»Faðirin helt seg gera væl ímóti henni. Duruta kom at hava tað gott í Norðfirði, bæði til matna og klædna. Duruta dugdi ikki at fata tað enn, so ung hon var. Men hon kom at skilja tað seinni, helt hann.«

Duruta kom ikki út úr kamari sínum, tað ið eftir var av degnum. Hon hugsaði um lívið hjá sær, hvussu tað hevði verið, og hvussu tað fór at verða. Faðirin var kanska góður við hana. Men hann hevði ongantíð sýnt henni, systkjum og mammuni tað. Hann var altíð í arbeiði. Var veður at vera úti, so var hann bønum ella í haganum. Var sjóveður, var hann á utróðri. Hann var raskur, tað søgdu øll, men fólk søgdu eisini, at hann leikaði so í, tí hann fyltist ikki. Hann helt, at høvdu tey kjøt, ull, mjólk og fisk, var tað nóg mikið. At gráta, flenna og vísa aðrar kenslur, var ikki fyri hann.

Seint um kvøldið kom Duruta uttar í roykstovuna. Øll vóru tigandi og hugdu ikki at henni, uttan Jóhanna. Hon hugdi upp á hana og var syrgin. Hon sýndi henni samkenslu. Tá Jóhanna fór í fjósið at mjólka, fór Duruta aftaná.

»Tú veitst, hvørja ætlan faðir hevur við mær,” segði hon. “Ja, eg havi hoyrt tað, og eg havi samkenslu við tær, tí eg veit, at tú ert góð við Jóan, og kenni eg teg rætt, verður tú ongantíð góð við Trónd. Tú ert góð við Jóan og kemur ikki at elska nakran annan.” “Eg haldi, at tú hevur rætt, eg komi ongantíð at elska nakran uttan Jóan; eg eri bara so. Eg eri ung, men Jóan og eg hava borið tokka til hvørtannað,«

líka síðan eg gekk til prest ella áðrenn tað. Sjálvandi var tað í spæli í fyrstani, men eg merkti, at Jóan eisini bar tokka til mín. So longu í spælinum birtist kærleikin okkara millum. Seinni er hann vaksin til nakað størri. Ja, vit hava lovað hvørt øðrum trúskap gjørgnum alt lívið, og nú skilir faðir okkum sundur. Kanst tú skilja, hvussu eg havi tað? Eg svíki Jóan móti mínum vilja.” “Jú, sjálvandi skilji eg teg. Eg veit, at tú hevur tað ringt. Eg kann siga tær, at Jóan hevur tað ikki betri. Hann er í døpurhuga,” svaraði Jóhanna. “Hevur tú sætt Jóan, og hvat segði hann?” spurdi Duruta. “Eg tosaði við hann í gjárkvøldið. Eg var niðri við Garð. Á veg niðanaftur møtti eg honum. Hann hevði verið her uttanfyri og vitað, um hann sá teg.” “Hevði hann tað? Eg sleppi ikki so langt, sum eg eri long. Men bíða bara. Royn tú at finna Jóan í dag og sig, at eg vil hitta hann í kvøld við Lítlafoss. Eg skal royna at finna uppá okkurt at vaska í ánni,” segði Duruta. “Tað skal eg gera. Eg fari inn til ommu eini ørindi, so tað man fara at bera til,” svaraði Jóhanna. “Takk skalt tú hava. Tað er gott at hava eina vinkonu sum teg.” “Tað er onki at takka fyri. Eg geri tað fegin.”

Jóhanna hugsaði um Durutu, tá hon fór út úr fjósinum við mjólkini. Duruta var eitt gott menniskja. Jóhonnu tykti synd í henni, at faðirin skuldi taka ræði av henni og gera av, hvønn drong hon skuldi hava. Var tað ikki Duruta, sum skuldi liva saman við honum. Hví hevði jarðargóðs alt at siga hjá summum? Í so máta var hon, Jóhanna, betur fyri. Ongin segði henni, hvønn drong hon skuldi hava ella ikki hava. Hon ráddi sjálv fyri tí. Hon var eisini góð við ein drong, sum hon visti eisini var góður við seg. Men hon og Krisjan, drongurin, vistu, at tey vóru fátæk og tí ikki sluppu at giftast uttan treytir. Og hesar treytir ætlaðu tey at lúka. Krisjan var farin í aðra oyggj at tæna sum húskallur, og hon var á Norðastustovugarðinum av somu søk. Tænastutíðin var 4 ár. Enn var skeiðið ikki hálvrunnið, men ein var fátækur og hevði lært at bíða í tolni. Tú fekst ikki nakað fyri onki. Tú mátti stríðast fyri tað, tú vildi hava, og hon var eisini hugagóð til tað. Tey ríku høvdu tað heldur ikki altíð so lætt sum eitt nú Duruta. Hon stríddist fyri tí, sum hon vildi hava í lívinum, men tað var eitt stríð, sum hon fór at tapa, meðan hon sjálv fór at vinna tað, sum hon hevði sett sær fyri. Hon sá fram til tann dag, tá Krisjan og hon skuldu deila borð og song. Song, ja, hvussu mundi tað vera at deila song við einum, ið ein ikki elskaði? Hon kundi ikki hugsað sær at farið í song við einum, hon ikki var góð við og so ígjøgnum eitt heilt lív. Tað mundi vera ræðuligt. Nei, hon skuldi ikki øvunda nakran. Hon var nøgd við lívið og síni foreldur, sum høvdu lært hana at vera nøgda við ta støðu, sum hon og tey vóru í. Gud var yvir øllum, og hann var við teimum fátæku eins og teimum ríku. Tað var at finna sær eitt stað í tilveranini, har tú vart tann, tú átti at vera: eitt menniskja, sum ikki royndi at seta seg sjálvt høgt, men livdi so fyri Gudi og menniskjum, at tú hevði góða samvitsku.

Um kvøldið gjørdi Duruta seg til at fara út í ánna at skola burtur úr einum plaggi. Komin í ánna var Jóan har beinanvegin. Hon hon segði honum, hvat faðirin hevði gjørt. Hevði lovað hana burtur. Og hann varð ikki at víkja frá sínum. Hon hevði onki at siga, varð ikki eftirspurd. Varð tvungin at giftast einum manni, sum hon onki legði í. “Eg elski bara teg, og eg komi ongantíð at gloyma teg,” græt hon. “Mín góði Jóan, kanst tú fyrigeva mær hetta?” tók hon uppaftur. “Góða Duruta, eg veit, at hetta hendir ikki við tín góða vilja,” segði Jóan. “Jóhanna hevur greitt mær frá støðuni. Men tað er, sum eg havi sagt: Eg eri ov fátækur til tín. Tað heldur faðir tín, um so tú ikki heldur tað. Men eg fari ongantíð at gloyma teg,” segði Jóan. “Eg fari heldur aldri at gloyma teg. Lívið er mær onki vert nú,” græt Duruta, meðan